Fylgiskjal 4

LM-045/2023

Gudrun Mortansdóttir Nolsøe

Fra: Henrik Møller <HEMOL@sorinskrivarin.fo>
Sendt: 25. september 2023 14:20
Til: Gudrun Mortansdóttir Nolsøe
Cc: Áki Andreasen
Emne: SV: Uppskot til broyting í revsilógini (kynslig avnoyðsla og lokking) verður sent tykkum til ummælis

Kære Gudrun

Retten på Færøerne har ikke bemærkninger til lovændringen, der, så vidt ses, svarer til de regler, som er gældende i Danmark.

Hvis det ikke allerede fremgår af lovbemærkningerne, kan det eventuelt overvejes at indsætte en henvisning til den tilsvarende danske ændringslov, for så vidt angår de pågældende bestemmelser (lov nr. 741 af 13. juni 2023).

Venlig hilsen
Henrik Møller
Retten på Færøerne

Fra: Gudrun Mortansdóttir Nolsøe <gudrunnolsoe@lmr.fo>
Sendt: mikudagur, 30. august 2023 09:38
Til: ´Post Sorinskrivarin´ <post@sorinskrivarin.fo>; Henrik Møller <HEMOL@sorinskrivarin.fo>; politi@politi.fo; MBO001@politi.dk; kif.faeroerne@krfo.dk; Elkin.Klettheyggj@krfo.dk; setur@setur.fo; 'bardurl@setur.fo' <bardurl@setur.fo>; Alfred Petersen <petersen@adv.fo>; Almanna- og mentamálaráðið <ammr@ammr.fo>; Heilsumálaráðið <hmr@hmr.fo>; Barna- og Útbúgvingar Málaráðið <bumr@bumr.fo>; kf@kf.fo; 'bvs@bvs.fo' <bvs@bvs.fo>; barnabati@barnabati.fo; Djóni Eidesgaard <djoni@barnabati.fo>; Ingmar Berg Mikkelsen <ingmarbm@gmail.com>; megd@megd.fo; Bárður Atlason Ísheim <bardur@megd.fo>; 'Amnesty International' <amnesty@amnesty.fo>; eda003@politi.dk; mail@psykolog.fo; Etiskaradid <er@er.fo>; Regin Berg <ReginB@er.fo>; kris@kris.fo; Kvinnuhúsið <post@kvinnuhusid.fo>; kvinnufelag@kvinnufelag.fo; kvinnusamskipanforoya@gmail.com
Emne: Uppskot til broyting í revsilógini (kynslig avnoyðsla og lokking) verður sent tykkum til ummælis

Uppskot til broyting í revsilógini (Kynslig avnoyðsla og lokking) verður við hesum sent tykkum til ummælis. Freistin at lata inn ummæli er mikudagin 27. september 2023.

Hjáheft verður uppskot til broyting av kapittul 24 í revsilógini sent tykkum til ummælis. Við uppskotinum verður ein nýggj áseting sett inn sum § 229 í kapittul 24, kynslig brotsverk. Ásetingin viðvíkur lokking (grooming). Samstundis verður § 225 víðkað til at fevna um kynslig avnoyðsla (sextortion). Somuleiðis verður § 228 víðka til eisini at fevna um lokking.

Uppskotið inniber yvirskipa hetta:

1) § 225, sum viðvíkur aðrar kynsligar gerðir enn samlegu, verður víðka til at fevna um føri, tá ið gerningsmaðurin fær órættaða til at fremja kynsligar gerðir á seg sjálvan.
2) § 228 sum ásetir á brot á ávísar ásetingar í revsilógini kann revsast, hóast gerningsmaðurin bert hevur verið ósketin í mun til tilstandin ella aldurin hjá órættaða, verður víðka til eisini at fevna um lokking.
3) Nýggj § 229 verður sett inn kapittul 24, sum viðvíkur lokking. Ásetingin ásetir at tann verður revsaður, sum miðvíst ella við snildir og við at misnýta sína yvirvág í aldri og royndum byggir upp eitt samband til ein persón undir 18 ár við ætlan um at fremja kynsligt brotsverk móti viðkomandi.

Uppskotið verður sent hesum pørtum til ummælis:

- Føroya Rætti
- Føroya Landfúti
- Kriminalforsorgini